# Fær blóðið at renna kalt í æðrunum

*–Nú ræður um ikki at standa stinn. Vit mugu fáa revolvaran niður aftur í slíðran og tosa saman sum vaksið fólk, sigur Høgni Hoydal, landsstýrismaður í fullveldismálum*

Áki Bertholdsen

–Ein skal hava rættiliga kalt blóð í æðrunum, tá ið ein hoyrir Poul Nyrup Rasmussen.

Hetta var fyrsta vimerkingin frá Høgna Hoydal, landsstýrismanni í fullveldismálum til tað, sum danski forsætisráðharrin segði á røðarapallinum í danska fólkatinginum hósdagin.

Henda dagin hevði Fólkatingið tað seinasta, stóra orðaskiftið, nú fólkatingssetan endar og tað høvi brúkti Poul Nyrup Rasmussen til enn einaferð at staðfesta, at skulu føroyingar hava fullveldið, verður skiftistíðin stutt

Hann legði eisini dent á, at talan verður heldur ikki um at útseta ígildiskomuna av fullveldissáttmálanum fyri at geva føroyingum ein andarhald, áðrenn vit skulu klára okkum við egnum búskapi.

Men hetta ræðir ikki oddamannin fyri føroysku fullveldisætlanini.

–Ongin skal halda, at samráðingarnar um føroyskt fullveldi byggja á tað, sum sagt verður á fólkatingsins røðarapalli, sigur Høgni Hoydal.

Sjálvur tekur hann ikki hesa avgjørdu støðuna hjá Poul Nyrup Rasmussen sum annað enn eina fráboðan, sum einans hevur til endamáls at ræða føroyingar frá at taka fullveldi.

–Tað er ongin sum helst ivi um, at Poul Nyrup Rasmussen roynir at forða fyri, at føroyingar fáa ein góðan sáttmála og at vit fáa eina rímiliga skiftistíð.

–Og hóast júst hetta er tann stóri trupulleikin, so verður altso ikki samráðst útfrá tí, sum verður ført fram í Fólkatinginum.

Høgni Hoydal sigur, at í veruleikanum eru samráðingarnar ímillum danir og føroyingar komnar ótrúliga langt.

At kalla tað einasta, vit mangla, fyri at kunna skriva undir ein sáttmála, er at fáa eina rímiliga skiftistíð, men tað er júst hetta, sum Poul Nyrup roynir at forða fyri við sínum avgjørdu fráboðanum.

### Revolvaran í slíðran

Høgni Hoydal sigur, at tað stóra takið á næsta samráðingarfundi um góðar 14 dagar, verður at staðfesta, hvat skal til fyri at vit kunnu fáa ein sjálvberandi, føroyskan búskap.

–Tað hava vit roynt á fundunum, sum hava verið, men enn hevur tað ikki so frægt sum eydnast at fáa orðaskifti í lag við donsku stjórnina um hetta.

– Tað einasta, vit hoyra, eru endurtøkur av revolvara-kendu fráboðanirnar um trý, fýra ára skiftistíð.

–Tað, sum nú ræður um hjá okkum, er at fáa revolvaran í slíðran aftur og at seta okkum niður at tosa saman sum vaksin fólk.

### Spara 20 milliardir

Landsstýrismaðurin í fullveldismálum sigur, at hann undrast á, hví danskir politikarar hava so avgjørda støðu til skiftistíðina.

Hann heldur, at tað kann vera tí, at teir ikki hava skilt, hvussu landið liggur.

–Støðan er tann, at okkara uppskot um eina skiftistíð upp á 15 ár, har blokkstuðulin stigvíst lækkar, hevði kostað danska ríkinum um sjey milliardir.

– Men skal blokkstuðulin halda fram óbroyttur tey næstu 20 árini, fer tað at kosta ríkinum einar 26 milliardir.

–Sostatt hevði ríkiskassin spart einar 19-20 milliardir, bara upp á 20 ár, við at tikið av okkara uppskoti, sigur Høgni Hoydal.

Hann heldur tað tí vera løgið, at danska stjórnin ikki vil geva okkum eina rímiliga skiftistíð.

Sjálvur ivast hann ikki í, at orsøkin er, at teir vilja varðveita ríkið sum tað er, hvussu víkir og vendir.

Og hann skilir væl, at Poul Nyrup Rasmussen ikki er fegin um at ríkið verður syndrað í hansara stjórnartíð, tí tað vil ongin ríkisleiðari.

– Alt annað vildi verið ábyrgdarleyst av honum, tí tað hevur stóran týdning fyri støðu Danmarkar í altjóða samfelagnum at hava eitt stórt ríki.

### Hava bundið seg

Men hetta hevur kortini ikki vikað Høgna Hoydal í trúnni um at tá ið av tornar, fáa eina rímiliga avtalu.

–Í eini avtalu við okkum frá 1998, hava danir bundið seg til at stuðla okkum í atskapa grundarlagið fyri einum sjálvberandi búskapi.

– Tí mugu vit brúka næsta samráðingarfund til at greina út, hvat krevst fyri at skapa eitt trygt grundarlag undir einum sjálvberandi búskap í Foroyum.

–Og av tí at hetta er at kalla tað einasta, sum skilir partarnar, er tað neyðugt, at brúka orkuna uppá at fáa samskifti við donsku stjórnina um tann spurningin.

– Og heldur stjórin fast um, at skiftistíðin bara skal vera trý, fýra ár, má hon grundgeva fyri, hví tað er nóg mikið til at kjølfesta tann føroyska búskapin.

Hann leggur afturat, at tað er løgið, at danska stjórnin noktar føroyingum somu skiftistíð, sum øll onnur lond fáa, og sum Danmark sjálvt hevur havt til at laga seg til evruna.

– Tað kann neyvan tæna áhugamálunum hjá donsku stjórnini, at føroyski búskapurin kemur í trupulleikar eftir fullveldið.

Men sjálvur er Høgni Hoydal ikki fyri at útseta ígildiskomuna av fullveldissáttmálanum.

– Tað haldi eg líkist mest einum snildum máta at keypa okkum nøkur ár eyka í skiftistíð.

– Tað sum tvørturímóti hevur týdning nú, er, at vit standa stinnir og halda fast um málið.

Og hvat honum viðvíkur, er málið enn púra greitt og tað er, at Føroyar skulu hava fullveldi og verða leyst av danska ríkinum.

Tvs, at hann góðtekur ikki eina avtalu, sum gevur Føroyum økt sjálvstýri í ríkisfelagsskapinum.

Og í hesum sambandi fær hann eisini givið andstøðuni á tingi eitt skot.

–Hevði tingið staðið saman, var málið langt síðani loyst.

– Andstøðan skal vera atfinningarsom. Men tað er ein stór forðing fyri málinum, at hvørja ferð ein fráboðan kemur frá Poul Nyrup Rasmussen, stendur ein andstøða til reiðar í Føroyum og tekur undir við hvørjum orðum.

Og Høgni Hoydal heldur, at tað er óheppið, at andstøðan í Føroyum letur seg brúka av okkara mótparti.

– Eg haldi, at hon átti at hugsa seg um, antin tað er rætt at lata seg brúka í einum innanýsis donskum talvi.

Hann vil ikki gera viðmerkingar til spurningin, um endamálið er at draga tíðina út til næsta val í eini roynd at fáa sambandsflokkin og javnaðarflokkin í samgongu tá, so at teir kunnu gera eina avtalu við danir innanfyri ríkið.

–Tað kunnu fólk sjálvi gera sínar metingar um.

– Men tað skerst ikki burtur, at hetta líkist taktikkinum, sum varð brúktur, tá ið sjálvstýrislandsstýrið sat fyrst í sekstiárunum.

Har vísir Svarta Bók á, at tá spurdi amerikanarar danir, hvat teir ætlaðu at gera.

– Danski forsætisráðharrin svarar rættiliga ítøkiligt, at fyrst er ætlanin at trýsta føroyingar at koma við einum ítøkiligum útspæli, tí tað væntaðu teir ikki, at føroyingar kundu semjast um.

–Skuldi tað eydnast, er ætlanin at royna at draga tíðina út og síðani er ætlanin uppvarpa týdningin av donsku ríkisveitingini fyri livifótinum í Føroyum.

– Og tað er akkurát sami taktikkur, sum brúktur í fullveldismálinum nú, sigur Høgni Hoydal.



*– Tað er ongin ivi um, at Poul Nyrup Rasmussen roynir at ræða føroyingar frá at taka fullveldi, sigur Høgni Hoydal*

# Foreldur mótmæla nýggju ítróttarhøllini í Hoyvík

*– Tað er ørskapur at byggja ítróttarhøll beint framman fyri skúlan, tí tað fer at seta børnini í stóran vanda, sigur formaðurin í foreldrafelagnum í Hoyvíkar skúla*

Áki Bertholdsen

Tað eru fleiri og fleiri sum finnast at ætlanunum hjá Tórshavnar Býráð at byggja eina nýggja ítróttarhøll uppi við skúlan í Hoyvik.

Áður hevur Lærararáðið á skúlanum mótmælt

Men nú taka foreldur at teimum børnum, sum ganga í skúlan,“ eisini um endan.

Høllin skal byggjast á stykkinum ímillum skúlan og Vegin Langa.

– Tað er tann reini, blanki ørskapur at byggja eina ítróttarhøll ímillum skúlan og vegin, sigur Thordur Thorsteinsson, sum er formaður í foreldrafelagnum í Hoyvíkar skúla.

Hann sigur, at bæði foreldur og skúlaráðið hava ferð eftir ferð víst á vandan, sum skúlabørn dag og dagliga eru í, tí skúlavegirnir eru so vánaligir.

Varðagøta við Skt. Fransskúlan er eitt klassiskt dømi um, hvussu út av lagi ein skúlavegur í Havn kann vera, uttan at nakað verður gjørt við tað.

– Tað sær tvørtur ímóti út til, at støðan bara versnar.

Og at byggja eina ítróttarhøll í millum Hoyvíkar Skúla og Vegin langa er ørskapur, sigur formaðurin í foreldraráðnum.

Hann sigur, at nógv foreldur hava vent sær til hansara at kæra seg um ætlanina.

Og nú fer foreldrafelagið at taka málið upp.

Tað hendir á fundi í foreldrafelagnum týskvøldið.

Og Thordur Thorsteinsson ivast ikki í, at úrslitið av hesin fundinum verður at foreldrafelagið fer at mótmæla ætlanini.

### Missa børnini úr eygsjón

Hann vísir á, at Vegurin Langi er ein tann vegurin í Havn, sum hevur mestu ferðsluna.

Og hann er longu ein út av lagi vánaligur skúlavegur, sum er. Ikki bara tí, at bilarnir eru nógvir í tali, og teir koyra skjótt.

Thordur Thorsteinsson sigur, at hann hevur sjálvu melda persóinbilar, sum hava yvirhála býbuss á Vegnum Langa við Skúlan.

Men hartil er hartil ógvuliga illa upplýstur.

– Verður ítróttarhøllin bygt, fer ferðslan harafturat at økjast munandi.

Hann sigur, at eftir teimum upplýsingum, hann hevur fingið eru parkeringsviðurskiftini við høllina vánalig, og ikki minst tað hevur loypt ótta á okkum, tí vandi er fyri, at bilar fara at standa hvar sum helst.

Formaðurin í foreldrafelagnum sigur, at verður høllin bygt, fer tað tí at gera umstøðurnar hjá børnunum nógv verri.

– Vit skulu eisini minnast til, at talan er um smá børn.

– Og verður høllin bygt, verður tað eisini ómetaliga trupult hjá lærarunum at halda eyguni við børnunum í fríkorterunum, sigur hann.

Δ








# Rás 2 og Pegasus hvør til sítt

*Nú er greitt, at samstarvið millum Rás 2 og Pegasus í Klaksvík er steðgað og sent verður ikki úr Pegasus sunnukvøldið, sum gjørt hevur verið 4 tey seinastu sunnukvøldini. Stjórin á Rás 2 sigur, at støðin metir Klaksvíkina vera sera áhugaverda og Rás 2 hevur tí hug at royna seg á egnum beinum har. Pegasus fer møguliga í samstarv við Útvarp Føroya*

Dagfinn Olsen

Samstarvið millum Studio Pegasus í Klaksvík og Rás 2 í Havn er steðgað.

Fyri góðum 4 vikum síðani fóru klaksvíkingar undir at framleiða tilfar at senda sunnukvøld. Teir keyptu nakað av útgerð og sendu so saman við Rás 2.

Steintór Rasmussen fyri Studio Pegasus sigur, at teir verða ikki í luftini sunnukvøldið. Hann sigur, at í Klaksvík royndu tey at gera seriøst arbeiði og at fylla eitt sunnukvøld út við fjølbroyttum tilfari.

– Vit hava havt greiða avtalu og vitað, hvar vit hava havt hvønn annan. Ætlanin hevur sjálvsagt verið at hildið fram, men so skuldi ikki verða, sigur Steintór.

Hann sigur, at tey í Pegasus nú kendu seg trýstan til at skriva undir sáttmála og at tey høvdu kensluna av, at Rás 2 kravdi og væntaði meira, enn tey í Klaksvík kundu liva upp til.

Hann dylir tó ikki, at semja er ikki um, hvussu skal farast fram á peningaliga økinum.

– Eisini snýr tað seg um, hvør skal eiga hvat og so framvegis, sigur Steintór og sipar millum annað til lýsingarinntøkur.

– Vit hava havt ein býtislykil, ið vit meta hevur verið sera rímiligur, tó tað eingin gullmina hevur vertið, sigur Steintór Rasmussen.

- Vit verða ikki í luftini sunnukvøldið, tí vit vita t.d. ikki, um vit koma í luftina, sjálvt um vit senda, sigur Steintór viðvíkjandi steðginum í samstarvinum.

### Framtíðin

– Hvørjir møguleikar nú eru, kunnu fólk gita sær til, sigur Steintór og nevnir t.d. samstarv við Útvarp Føroya.

Hann hevur varhugan av, at tey í ÚF eru áhugað og taka Pegasus í álvara.

– Rás 2 fer nú í gongd her norðuri fyri seg sjálvan og fær sostat norðoyastevnuna við.

– Hitt alternativið hjá okkum er at senda sjálvir og lokalt her norðuri, sigur Steintór Rasmussen fyri Pegasus, ið hevur alla útgerð til endamálið.

– Vit hava vunnið okkum royndir og kunnu liva við, at hetta dettur niður fyri. Tað skal bara ikki vara ov leingi. Tað er heilt víst, at hildið verður fram so ella so og vit mugu smíða, meðan jarnið er heitt, sigur drívmegin aftanfyri Pegasus, Steintór Rasmusnen.

Tað eru góðar 4 vikur síðani, at Pegsus og Rás 2 byrjaðu at samsenda og klaksvíkingar hava verið á skránni 4 sunnukvøld.

– Vit hava prógvað, at tørvur er á og at hugaligt er at hoyra onnur fólk, enn tey, ið altíð eru í luftini. Eisini hava vit prógvað, at tað ber til at senda úr Klaksvík, sigur Steintór Rasmussen, ið leggur dent á, at tey í Pegasus ikki ætla at brenna nakrar brýr.

### Í besta forstáilsi

Stjórin á Rás 2, Petur Jacobsen sigur, at samstavið við Pegasus var ein roynd. Á Rás 2 verður mett, at Klaksvíkin er so mikið áhugaverd, at Rás 2 hevur avgjørt at royna seg á egnum beinum, tí mett var, at tað var ikki nóg mikið, ið fekst burturúr samstarvinum við aðra støð.

– Eisini vigaði rættiliga tungt, at vit vóru ikki greiðir yvir, um vit høvdu loyvi at halda fram. Vit kunnu ikki selja senditíð. Spurningurin er, um vit hava loyvi til at knýta saman við Pegasus í Klaksvík hvørt sunnukvøld klokkan 19. Í okkara sendiloyvi stendur klárt, at vit kunnu ikki avhenda senditíð, og hetta hevur vigað tungt í okkara meting, sigur Petur Jacobsen.



*Manningin í Pegasus, sum hevur staðið fyri skránni hjá Rás 2 sunnukvøld. Nú er samstarvið endað og manningin í Klaksvík verður ikki at hoyra sunnukvøldið*

Hann metir annars Klaksvíkina vera sera áugaverda, bæði sum marknað og eisini, tí góð fólk eru á staðnum, ið kunnu gera sendingar.

Hann leggur dent á, at viðvíkjandi Pegasus er alt hent í besta forstáilsi og har eru »no hard feelings«.

Petur Jacobsen sigur, at í komandi viku eru teir klárir við einum studio í Klaksvík og at á Norðyastevnu vónar Rás 2 at vera komin fyri seg í Klaksvík.

### Vágoy og Suðuroy

Tað er eingin loyna, at Rás 2 ætlar sær at røkka hvønn krók í landinum. Støðin hevur søkt Suðuroyar Sparikassa um stuðul til sendara, so sendast kann í Suðuroynni. Henda umsókn verður viðgjørd í sparikassanum í juni, hevur Rás 2 fingið at vita.

Eisini hevur Rás 2 fingið frekvens á Støðlafjalli og inni vist í húsum hjá SEV á Sornfelli. Tá hetta kemur í rættlag, kann Vágoyggin røkkast. Og við rættningsantennu og sonevndum repeetara, kann tá eisini Suðuroyggin røkkast, sigir Petur Jacobsen, ið leggur afturat, at avgerandi fyri inntøkugrundarlagið hjá støðini er, hvussu nógv fólk hoyra.

Hann er ikki bangin fyri, at t.d. Pegasus verður ein kappingarneyti hjá Rás 2.

– Tað er hart arbeiði og tað krevur nógvan pening at gera útvarp. Og annars er sera sunt við kapping, sigur Petur Jacobsen.

Tað eydnaðist ikki at fáa eina viðmerking um ætlanirnar hjá ÚF í Klaksvík frá Jógvani Jespersen, útvarpsstjóra, áðrenn blaðið fór til prentingar.



*No hard feelings, sigur Petur Jacobsen frá Rás 2 um endaða samstarvið við Pegasus í Klaksvík, har tey heldur ikki siga seg vilja brenna brýr*


